ítróttur

Nr. 37 • týsdagur • 24. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Neistin-VÍF 22-24 (11-13):

Skerdir neistamenn dragnaðu

Uttan vanligu stórskjúttarnar megnaði Neistin ikki at basa VÍF, sum tó als ikki tykist vera vaknað úr kreppuni, sum liðið hevur verið í í ár

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Uttan Heina Hanusarson og Dragisa Stojovic líkist Neistin á ongan hátt nøkrum liði, sum skal gera sær vónir um gullmerkini í føroyskum manshondbólti.

Og tó at VÍF við sigrinum bara er tvey stig frá silvurplássinum, so tykist tað á ongan hátt vera so, at liðið er komið úr aldudalinum, sum teir hava verið í stóran part av kappingarárinum.

Hesar báðar niðurstøðurnar mundu vera tær, sum lógu fremstar í huganum hjá teimum áskoðarum, sum sunnudagin høvdu leitað sær í Høllina á Hálsi til dystin millum bæði liðini.

Umframt teir báðar áðurnevndu, so hevði Neistin eisini tann trupulleika, at Karl Oddmar Rasmussen – sum hevur verið ein hollur stuðul í verjuspælinum – var burturstaddur, og tí var talan um eitt munandi skert lið, sum skuldi upp til nakað, ið liktist eini prógvtøku. Eini prógvtøku, har liðið skuldi prógvað, at tað ikki bara vóru ein ella tveir leikarar, sum gjørdu av, hvussu endastøðan skuldi verða.

Talan var fyri tað nógvu um eina rótuta uppgerð, tá Neistin misti takið á oddasessinum, har teir nú skulu hava hjálp frá øðrum liðum, um tað skal eydnast at taka Kyndil aftur

Mynd: Álvur Haraldsen

Neistin haltaði

Men tað stóð tíðliga greitt, at tað skuldi gerast ógvuliga tungt hjá Neistanum at fáa nakað sum helst burtur úr dystinum.

VÍF legði seg mest sum alt fyri eitt nøkur fá mál framum, og tó at munurin ikki var tann heilt stóri – 9-5 tá hann var størstur – so sótu áskoðaranrir fyri tað mesta við varhuganum av, at Neistin mátti stríðast nógv meira fyri sínum málum.

Álopsspælið var munandi broytt, nú Áki Mørk og Dann Thorleifsson røktu bakkarnar, meðan miðplássið, sum Áki vanliga tekur sær av, gekk upp á skift millum serliga Helga Justinussen og Ára Rouch. At Birgir Kass so eisini hevði onkran smávegis skaða at dragast við, og tí ikki fekk stuðlað nóg væl á Vøllinum, gjørdi ikki støðuna hjá liðnum betri.

VÍF hinvegin tóktist heldur ikki at hava nakað flótandi spæl. Hinvegin varð uppgávan ikki so øgiliga torfør í verjupartinum, har Neistin kanska hevði ferðina – alt ov nógva til tíðir – men sjáldan samskipan ella hugflog til veruliga at gera um seg. Og í álopssparinum hevur VÍF-liðið hóast alt somikið at gjøgnumbrotsstyrki, at talan altið gerst um nøkur mál.

Einastu leikararnir, sum veruliga skaraðu framúr, mundu vera teir báðir málverjarnir, Jota og Eli, sum báðir høvdu fleiri góðar bjargingar, tá mistøk í álopspartinum kostaðu kontra-møguleikar til mótstøðuna.

Soleiðis gekk dysturin sína linligu gongd, men í seinna hálvleiki gjørdi Neistin brádliga ein vørr. Teir vunnu seg skjótt upp á javnleikin, og eina lítla løtu vóru teir eisini á odda, men so kom VÍF aftur. Fyrst og fremst tí Sámal kom aftur í verjuna, eftir at hann hevði hvílt seg á beinkinum eina løtu, og tá Dejan Lacok so eisini kom inn og stóð sera væl, fánaði Neistin aftur.

Teir megnaðu framvegis so dánt at hanga í, men meira enn tað sama gjørdist tað ikki. VÍF hevði alla tíðina munin við einum og tveimum málum, og tá Harald Bjørgvin í seinasta minuttinum skoraði til 23-21, stóð avgerðin greið. VÍF hevði ognað sær tvey stig, sum aftur førka liðið móti oddinum, meðan Neistin hinvegin hevði mist tvey sera týdningarmikil stig. Um teir mistu meistaramøguleikan, ber illa til at siga enn, men í øllum førum skulu teir nú hava hjálp frá øðrum liðum, um tað skal eydnast at taka Kyndil aftur.

Kreppan ikki liðug

Hóast sigurin, so er tað ein staðfesting, at hjá VÍF er kreppan á ongan hátt liðug enn.

Onkur hevur tosað um, at leikararnir nú eru ov gamlir og útbrendir, men føðibrøvini á liðnum samsvara tó ikki heilt við hesa útsøgn. Heldur man talan vera um eina mettu, sum hevur rakt hópin, eftir at liðið fleiri ár á rað hevur hoyrt heima í avgjørda oddinum. Ein metta, sum ráðini ikki eru til, tá hini liðini samstundis leggja nógv fyri í royndunum at vinna seg upp á oddin.

Enn eru tað tó bert Ingi og Harald, sum fara at nærkast spjaldrinum við seinasta søludegi, men í aðrar mátar tykist VÍF framvegis at vera eitt lið, sum kann gera nógv um seg. Tað krevur tó fyrst og fremst av leikarunum, at teir taka í egnan barm og vísa nakað av tí spælinum, sum hevur ført liðið til tvey gullmerki seinastu fýra árini. Tað hava teir bara víst eina ferð hetta kappingarárið, og tað er langt ífrá nóg mikið til nakað meistaraheitið - og kanska heldur ikki til heiðursmerki.

Dysturin í tølum
Neistin-VÍF 22-24 (11-13)
Málskjúttar
Neistin: Áki Mørk 9(5), Dann Thorleifsson 4, Finnur H. Petersen 3, Ári Roucj 3, Ragnar Stakksund 1, Blagoje Buha 1, Helgi Justinussen 1
VÍF: Johnny Joensen 5, Ingi Olsen 4(1), Sámal Joensen 3(1), John Zachariassen 3, Agnar Joensen 2(1), Daniel Rápa 2, Áki G. Olsen 2, Harald Bjørgvin 2, Petur Frank Joensen 1
Brotskøst: Neistin 5, VÍF 5
Útvísingar: Neistin 2, VÍF 8
Diskvalifikatión: VÍF 1 (3X2 minuttir)
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Uni Wardum.
Høvdu eina sera trupla uppgávu, har rótuta spælið gjørdi sítt. Megnaðu tó hampuliga væl at halda skil á óruddinum og royndu at halda eina greiða linju, har leikararnir vistu, hvat varð loyvt og ikki.

Atli Gregersen til GÍ

Barnaárinin vóru í B36 og víðari menningin í Danmark, men ættarbondini eru úr Gøtu, og tað verður har, at Atli Gregersen nú skal royna seg í fremstu føroysku fótbóltsrøðini

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Eisini í Gøtu hava tey í longri tíð roynt at fyrireikað seg til nýggja kappingarárið í fótbólti.

Í mun til so nógv onnur feløg, so hevur tað kanska verið nakað friðarligt í Gøtu í so máta, men nú eru so onkur tekin um, at liðið aftur í ár ætlar sær at leita móti oddinum.

Og í royndunum í hesum hevur felagið gjørt avtalu við Atla Gregersen, um at hann skal spæla í Gøtu komandi kappingarárið.

Jógvan Gregersen, sum vanliga hevur við leikarahópin í GÍ at gera – og sum eisini er pápabeiggi Atla – váttar fyri Sosialinum, at nakað er um tosið.

- Tað er so planurin, at hann skal spæla fyri okkum í summar. Atli hevur búð niðri í nøkur ár, men nú ætlar so fyribils at flyta heimaftur, og so hevur tað eydnast okkum at fingið fatur á honum, sigur Jógvan.

Spennandi fongur

Og fyri tey við kunnleika til føroyskan fótbólt tykist hetta vera ein sera spennandi fongur, sum GÍ við hesum hevur fingið.

Atli Gregersen leikti í ungdómsárunum við B36, og longu tá varð hann mettur millum bestu leikararnar í sínum árgangi. Pláss á føroyskum ungdómslandsliðum lótu heldur ikki bíða eftir sær, og tá hann seinni flutti niður, helt hann eisini fast um hesi pláss.

Í Danmark hevur hann verið knýttur at fótbóltsskúlanum í Hesselgods, umframt at hann í nøkur ár var við í hópinum hjá Randers Freja í næstbestu donsku deildini.

Hetta seinasta árið hevur hann búleikast í danska høvuðsstaðnum, og her hevur hann leikt við Lyngby, har hann millum annað hevur verið liðfelagið við feskasta landsliðsáleyparan, Christian Holst Lamhauge.

Hann verður vanliga roknaður at hoyra heima á miðvøllinum og í verjuni, men akkurát, hvar GÍ fer at brúka hann, er tó ikki gjørt av enn.

- Tað verður so nakað, sum Krzystof fer at gera av, sigur Jógvan Gregersen um hetta seinasta.



B68 styrkir um verjupartin

Toftamenn hava mist nógv fólk í mun til farna kappingarár. Nú hevur B68 tó styrkt seg við fyrrverandi B36-verjuleikaranum, Herbert í Lon Jacobsen, ið kemur heim av flatlondum

FÓTBÓLTUR
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Tað hevur ikki sæð nakað serligt út við hópinum hjá toftamonnum til komandi kappingarár. Serliga í verjupartin hevur tað sæð svart út, við tað at so sterkir leikarar sum Hans Fróði Hansen, Arnbjørn Danielsen og Dánial Hansen eru farnir í onnur feløg her heima ella uttanlanda. Harafturtat hevur felagið mist helst besta miðvallaran í Føroyum seinasta kappingarár, Fróða Benjaminsen, umframt Jann Inga Petersen og John Hera Dam. Tilgongd við felagið hevur havt undan komandi kappingarári er bert Brynjálvur Nielsen úr NSÍ, og so teir báðir Przybylski brøðurnar úr ávíkavist GÍ og LÍF.

Nú er tað tó greitt, at verjupartin fær ein kærkomnan styrk. Sterki verjuleikarin, Herbert í Lon Jacobsen, sum áður hevur leikt í B36, fer at spæla við B68, nú hann kemur aftur úr Danmark. Tað er heimasíðan hjá B68, www.b68.fo, ið skrivar hesi tíðindi. Herbert hevur verið niðri á løgregluskúla, og nú manglar honum bert tað seinastu praktiktíðina, og hana tekur hann her heima.

argus - 04-0078

Søluumboð
í Føroyum

Vegna øktan eftirspurning, og tað at skipið Skaftafellið umskipar í Klaksvík, verður søkt eftir einum fólki at røkja virksemið hjá felagnum í Føroyum. Starvsmaður verður starvandi í Føroyum. Starvið hoyrir undir útflutningsdeildini sum er í Reykjavík.

Starvið:
· Tænasta og viðskiftafólk
· Søla og kunnan av tænastum felagsins
· Tilboðs- og sáttmálaavgerðir
· Sølustevnir og átøk í marknaðar og søluætlanum
· Arbeiða við ymiskum uppgávum samstundis

Førleikakrøv:
· Royndir innan søluarbeiði
· Kunning innan sjóvinnu
· Kunna arbeiða skipað og sjálvstøðugt
· Kunna vísa áræði viðvíkjandi fyritøkuni
· Hava HH-, studentsprógv ella líknandi
· Duga at samskifta bæði í skrift og talu
· Góðan teldukunnleika
· Hava rímuligan førleika í enskum í skrift og talu

Skrivlig umsókn við avrit av prógvum og møguligum viðmælum skulu verða Samskip Holtabakka, við Holtaveg, 104 Reykjavík, Ísland, í hendi innan 5.mars 2004. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Hinrik Bjarnason deildarleiðara, á tel. +354 569 8386.

SAMSKIP

Holtabakki at Holtavegur | 104 Reykjavík | Iceland | Tel. +354 569 8300 | Fax +354 569 8327 | samskip.is

Samskip er ein skjótt vaksandi altjóða flutningsfyritøka, sum bjóðar viðskiftafólkum sínum ymiskar flutningsmøguleikar og tilhoyrandi tænastu, runt allan knøttin. Samskip hevur skrivstovur báðu megin Atlanshavið. Í fyritøkuni starvast 850 fólk á 31 skrivstovum í 14 londum. Endamálið hjá Samskip er at vera á odda í uppbyggjan og viðkan av flutningsmøguleikum og at veita viðskiftafólkum sínum sera góða tænastu.